# ... Søguligar filmsverkætlanir í aldargomlum umhvørvi



*Stovu-leikpallur frá stummfilmstíðini hjá Nordisk Film*



*4 búnar, sum kunnu fáa smílini fram hjá øllum. Yvonne, Egon, Benny og Keld úr Olsen-bandanum*



*Búnarnir hjá teimum fínu damunum í Matador*




*Eitt skapandi og mennandi arbeiðsumhvørvi úti í Valby*

hvussu stórur retorikari Petur Mohr Dam varð. Uni vísir á, at Jákup Andreas Arge hevur gjørt eitt stórt arbeiðið fyri at bjarga mentunnararvi føroyinga. Annað filmsbrot er við neytakonum í Húsavík, har tað hevur eydnast Jákup Andriasi at yvirtala tilkomnar kvinnur í Húsavík at vísa á filmi aldargamla føroyska arbeiðssiðin: at fara til neytar. Gamli svenski filmsmaðurin, Steen Nordenskiøld, sum var ein stórur Føroya-vinur, og ikki minst Skúvoyar-vinur eigur eisini sín part av verkætlanini "Føroyskar Søgur 2". Í 1951 framleiddi Steen Nordenskiøld ein litfilm, har hann sjálvur greiddi frá tí, sum fór fram. Myndir eru tiknar kring oyggjarnar, men sjálvandi fyllir Skúvoy nógv. Svenskarin bar so stóran alsk til Skúvoy, at hansara seinasta ynski varð, at jørðisku leivdirnar hjá honum, skuldu stroyðast yvir oynna, sum stóð hjarta hansara so nær.

## Filmsbrot við Ingálvi av Reyni

Millum onnur forkunnug brot, eru 16 mm litfilmarnir hjá James og Alf Cordiner í Aberdeen. Teir vitjaðu í Føroyum, í bæði 1948, 1953 og 1957, og liggja nógv góð filmsbrot eftir frá feðgunum í Aberdeen, sum vóru handilsmenn, sum vóru komnir í samband við nógvar føroyingar, serliga føroyingar innan brøðrasamkomuna. Millum betri filmsbrotini hjá Cordiner-monnunum, er vitjanin hjá Ebenezer-kórinum í Aberdeen á sumri í 1948. Á filmsbrotinum ber til m.a. at síggja ein ungan og spelknan Ingálv av Reyni, sum tá var bert 28 ára gamal. Litfilmsbrotini eru óvanliga skørp og klár, ikki minst tá hugsað verður um, at tey eru meiri enn 60 ára gomul.

## Ov nógv farið fyri skeyti

Uni og filmsklipparin, Helgi Toftegaard úr Fuglafirði fegnast um tann føroyska mentannararvin teir sita við úti í Valby. Men Uni letur ongan iva verða um, at hann harmast um alt tað, sum er farið fyri skeytið, ikki minst í savninum hjá bæði almenna útvarpinum og sjónvarpinum. – Tað hevur alt ov lítil virðing og stuðul til tey, sum hava gjørt eitt stórt arbeiðið, fyri at dokumentara tað føroysku søguna. Uni nevnir Jákup Andrias Arge o.a. sum hava gjørt eitt stórt ósjálvssøkið arbeiðið fyri at dokumentera tann føroyska mentannararvin, og at slík undangongufólk áttu at verið stuðlaði í teirra megnararbeiði. Uni letur ongan iva verða um, at hann heldur, at Almennu Føroyar mangla eina savns- og varðveitingarmentan, og at tað er syndarligt at síggja alt tað, sum fer fyri bakka.

## Tónleikasøgan manglar

Í hesum døgum situr Uni so og skrivar handritið, sum frásøgufólkini skulu lesa til partarnar í "Føroyskar Søgur 2". Kortini saknar Uni ein týdningarmiklan part av nýggjaru søgu Føroya. Tað hevur ikki eydnast Una at finna filmsbrot, sum lýsa pionerárini í føroysku popp- og rocksøguni. Uni heitir so inniliga á fólk, sum eiga slík filmsbrot, ella vita um folk, sum eiga slík filmsbrot, um at siga sær frá, sum skjótast. Tað ber til hjá fólki at senda teldupost til ulh@substanz.fo. Fólk kunnu eisini ringja til 0045 22490919. Tað ber eisini til hjá fólki at fara inn á www.foroyskarsogur.fo, har mangt forvitnisligt er at síggja og lesa um spennandi verkætlanina.

**Hoyr samrøðurnar, sum vóru gjørdar úti í Nordisk Film á Rás2, mánamorgun 9. mars kl. 10**

Sosialurin